# Verkætlan

Kunning

# Trapputrinini

Á talvuni sæst, hvussu spurdómarnir kunnu býtast upp, men legg til merkis, at fyrsti spudómur er á niðasta trini, og at arbeitt verður uppeftir her. Legg eisini til merkis munin millum evnis- og verkætlanararbeiði!



# Hvussu verður arbeitt við verkætlan?

Tá ið arbeitt verður við einari verkætlan - skal man loysa ein trupulleika og seta spurningar til, hvussu “tingini” hanga saman!

- **HVÍ, HVAT OG HVUSSU**

**Tí skal ein verkætlan taka støði í einari trupulleikaorðing**

# Trupulleikaorðing

Trupulleikaorðingin skal vera ein stutt nágreinan av partevninum og innihalda nakrar opnar spurningar.

Trupulleikaorðingin skal geva íblástur til at gera kanningar og finna frágreiðingar.

Kanningarnar skulu gera ein føran at gera metingar og koma til niðurstøður.

# Trupulleikaorðing

Tað er trupult at gera eina góða trupulleikaorðing, men tað ber væl til ;-)

Brúka góða tíð at orða trupulleikan, tíðin verður vunnin innaftur í hinum endanum!

Trupulleikaorðingin virkar sum ein reyðurtráður í arbeiðinum at loysa trupulleikaorðingina!

# Hugskot til arbeiðið við trupulleikaorðing

BRAINSTORM

Hvat veist tú um evnið, hvat vilt tú gjarna finna útav? Hvønn áhuga hevur tú í evninum? Lat heilan leysan og skriva alt niður í hesum sambandi! Sortera aftaná.

# Hugskot til arbeiðið við trupulleikaorðing

## Orða spurningar til trupulleikaorðing

1. **Data/upplýsingartilfar (Hvat, hvør, hvar)**
2. **Frágreiðingarspurningar (Hvussu, hví)**
3. **Metingarspurningar (Er tað rætt at, er sammanhangur millum,**
4. **Atgerðarspurningar/handlingsspørgsmål (Hvat kan ein gera fyri at, hvussu kunnu vit broyta, hvørjir møguleikar eru)**

.

Eisini er vert at hava í huga, hvar kunnu vit finna upplýsingar, hvussu nógvar keldur eru á økinum?

# Skriva trupulleikaorðing

Orða eitt stutt skriv um tít/tykkara partevni. Orðingin kan t.d. Byrja við “Tað undrar okkum at….” ella “ Tað er ein trupulleiki at….” ella “Hvussu ber tað til at….”

Orðingin kan eisini verða ein staðfesting t.d. “Martin Luther King gjørdi ein stóran mun fyri teir svørtu amerikanararnar….” - Síðani má ein finna fram til ein trupulleika!

# Dømi - Trupulleikaorðing

1. Hvat er krabbamein?
2. Hví og hvussu verður ein raktur av krabbameini?
3. Er tað so, at krabbamein og lívsstílur hanga saman?
4. Hvat kann verða gjørt fyri at fyribyrgja og grøða krabbamein?

# Dømi - Trupulleikaorðing

1. Hvat inniber javnstøða millum kyn?
2. Hví skal tað vera javnstøða millum kyn?
3. Er tað so, at tað er munur á kvinnu- og mansrættindum í Føroyum?
4. Um neyðugt, hvat kann gerast á javnstøðuøkinum?

# Spurdómar

1 Hvat veitst tú um evnið?

2 Hvat vilja tit kanna?

3 Hvussu vilja tit gera kanningarnar?

4 Hvønn áhuga hevur tú fyri evninum?

5 Ber til at gera atgerðarspurning/ar til evnið?
– Finn dømi!

6 Hvussu vilja tit sýna úrslitið fram?

7 Hvørjum tilfari hava tit brúk fyri?

8 Hví hava tit valt júst hetta evnið?

**Gerið eina tíðarætlan, ið tit kunnu halda!**